## Rás 2 víðkar um sendiøki

*Útvarpsrásin Rás 2 vónar at senda umvegis Sornfelli og Støðlafjall í heyst*

EYÐUN KLAKSTEIN

Rás 2 vónar at kunna røkka enn fleiri føroyingum í heyst.

Øll neyðug loyvi eru fingin til vega, so at Rás 2 kann seta sendara á Sornfelli og Støðlafjall, og hetta fer at gera, at Rás 2 millum annað eisini kann hoyrast í Vágum og á Sandoynni.

- Vit hava fingið øll loyvi til vega, og pengar eru eisini funnir til sendarar, so vit vóna, at vit fáa sett sendararnar upp einaferð í heyst, sigur Petur Jacobsen, stjóri á Rás 2.

### Vilja røkka fleiri

Í løtuni sendir Rás 2 til høvuðsstaðarøki, stóran part av Eysturoynni og til Klaksvíkar.

- Vit meta, at vit røkka út til tveir triðingar av føroyingum í løtuni, men vit vilja gjarna røkka enn longur, sigur Petur Jacobsen.

Umfamt sendaran í høvuðsstaðnum, hevur Rás 2 eisini ein sendara á Brúnaskarði. Hendan sendaran hevur Norðoya Sparikassi goldið, og Sosialurin hevur skilt, at tað verða líknandi avtalur sum koma at gera, at Rás 2 fer at fáa sendara á Støðlafjall og Sornfelli eisini.

Rás 2 sendir í løtuni á 102 og 107 MZh, men frekvensirnir til nýggju sendararnar eru longu fingnir til vega.

## ADJ selir ljóðútgerðina

*ADJ Sound ætlar sær nú at sleppa sær av við alla ljóðútgerðina, sum felagið leigar til konsertir og dansir í landinum*

EYÐUN KLAKSTEIN

Seinastu trý árini hevur ADJ Sound havt eina monopollíknandi støðu, tá tað umræður ljóðannlegg til størri tónleikatiltøk í Føroyum.

Men nú ætlar ADJ Sound at sleppa sær av við hendan partin av virkseminum, og øll leiguútgerðin skal seljast.

- Tað hevur verið strævið at havt útleiganina, og nú halda vit, at tað er rætta tíðin at sleppa okkum av við hana, sigur Petur Jacobsen, sum er stjóri í ADJ Sound.S

Umframt útleigan av ljóðannleggum, selir ADJ Sound eisini útgerð, og felagið eigur og rekur Rás 2.

### Ikki misbrúk støðuna

ADJ Sound keypti fyrsta stóra anleggið hjá sær, tá Oslo Gospel Choir var í Føroyum í 1995. Útgerðin varð keypt eftir lista yvir útgerð, sum norska kórið segði seg hava brúk fyri, tá tey skuldu hava konsert.

Í desember mánaði í 1997 keypti ADJ Sound kappingarneytan CAL, og síðani tá hevur ADJ Sound verið einasti veruligi útbjóðarin av stórum ljóðannleggum í Føroyum.

- Eg haldi ikki, at vit hava misbrúkt okkara støðu, sigur Petur Jacobsen um farnu trý árini.

### Nógv útgerð

ADJ Sound eigur útgerð fyri umleið 2 milliónir krónur, og tað er hendan útgerðin, sum nú er til sølu.

- Tað bilar einki, um tað koma nýggj fólk til nú, men tey, sum skulu leiga ljóðútgerð út, skulu verða enthusiastar, tí tað er sera strævið, heldur stjórin á ADJ Sound.

Og við søluni av útleiganini, leggur ADJ Sound seg alt meira eftir rakstrinum av Rás 2.



*Petur Jacobsen og ADJ Sound ætla sær at sleppa av við ljóðútgerðina, sum felagið hevur leigað til konsertir og dansir kring landið*

# Bjóða heimleysum inn um dagin

*Millum 30 og 40 fólk eru hvønn dag á kaffistovuni hjá Blákrossi í høvuðsstaðnum. Eisini heimleys brúka tilboðið*

EYÐUN KLAKSTEIN

Heimleys í høvuðsstaðnum, sum ikki hava hug at ganga á gøtuni allan dagin, hava møguleikan at leita sær á Café Blákrosstovuna, sum hevur opið allar gerandisdagar.

- Øll eru vælkomin inn hjá okkum, og vit seta ongar treytir fyri, hvør kann sleppa inn, sigur Símun Joensen, sum er leiðari av Blákrosscaféina. Caféin hevur opið frá klokkan 14.00 til 22.00.

Fólk sleppa ikki at brúka rúsevni inni á kaffistovuni, men tey sleppa inn, hóast tey eru ávirkað.

- Tá vit lótu upp, var ikki altíð so friðarligt, tí vit løgdu eina linju, sum gestirnir skuldu venja seg við. Men nú eru ongir trupulleikar, og hetta má vera tann friðarligasta caféin í býnum, sigur Símun Joensen.

### Eisini heimleys

Seinastu tíðina hevur nógv verið frammi um tey heimleysu í høvuðsstaðnum, og at tey ongastaðni hava at vera um dagin. Um náttina gista tey a Herberginum hjá Frelsunarherinum, men um dagin er stongt har.

Men heimleys eru eisini vælkomin á Blákrosscaféina, og tað eru eisini nógv teirra, sum brúka hetta tilboðið.

- Tá vit lótu upp, høvdu vit opið fyrr á degnum, men vit broyttu nevniliga upplatingartíðirnar, so tey heimleysu kundu fáa meira burturúr okkara tilboði. Nú kunnu tey sita inni hjá okkum til klokkan 10 á kvøldi, tá Herbergið letur upp, greiðir Símun Joensen frá.

Millum 30 og 40 fólk vitja hvønn dag Blákrosscaféina. Fólk av alskyns slagi koma á caféina - rúsevnisnýtarar, avvarðandi og eisini fólk, sum hava verið í viðgerð, brúka Blákrosscaféina. Í miðal eru millum 600 og 800 fólk á Blákrosscaféini hvønn mánað.

Bláikrossur hevur eisini tveir búfelagsskapir, har tilsamans 14 fólk búgva.

### Mugu koma í neyð

Símun Joensen sigur, at myndugleikarnir og sjálvbodnir felagsskapir skulu ansa eftir ikki at hjálpa rúsevnismísnýtarum og heimleysum longur út á síðusporið.

- Eingin sleppur at nýta rúsevni inni hjá okkum, og tað má ikki koma nakað stað, har heimleys verða boðin inn um dagin, og tey sleppa at sita og drekka. Gera vit tað, ja, so hjálpa vit teimum longur út, sigur leiðarin av Blákrosscaféini.

- Sjálvandi skulu vit ikki lata tey doyggja í kulda, men vit skulu verða eitt sindur varðin við teimum tilboðum, sum vit bjóða teimum, heldur Símun Joensen.

### Stórt hall

Blákrosscaféin fær ongan almennan stuðul, men verður hinvegin rikin við ymsum gávum. Í fjør hevði kaffistovan 88.000 krónur í halli, og í ár rokna tey við um 220.000 krónum í halli.

- Vit hava fingið ómetaliga góðan stuðul frá privatfólki, skipum og øðrum, men tað ber illa til at byggja ein rakstur á gávur. Tí hevði tað komið sera væl við, um vit fingu stuðul frá til dømis Tórshavnar kommunu, sigur Símun Joensen.

Blákrosscaféin hevur í tvey ár roynt at fingið stuðul til at reka caféina, men enn hevur tað ikki givið úrslit. Tórshavnar kommuna læt í 1998 50.000 krónur til raksturin fyrstu tríggjar mánaðirnar, men síðani er fleiri pengar ikki komnir.

Tórshavnar kommuna hevur nú kallað Bláakross inn til fundar um støðuna hjá teimum heimleysu, og hesin fundur skuldi verða seinnapartin í gjár.

# Kular Røtur í Havn

*Kular Røtur og Trølla-Pætur fyrireika nú stóra konsert í ítróttarhøllini á Hálsi*



*Kular Røtur og Trølla-Pætur fara at hava konsert stóra konsert í ítróttarhøllini á Hálsi*

Leygardagin 7. oktober verður stór konsert í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Tá fara Kulu Røturnar á pallin við vælkendum barnasangum, dansigentum og myndashowi á stórskíggja. Eisini fer Trølla-Pætur at verða við á konsertini.

Kular Røtur hava givið tvær fløgur út seinasta árið, og hesar fløgurnar hava verið serstakliga væl umtóktar. Sangir sum *Hon er omma mín, Bilurin hjá okkum, Grønir menn frá Pluto* og *Flippan* var verið nógv at hoyrt.

Trølla-Pætur, sum hevur sungið onkran sang á fløgunum hjá Kulum Rótum, er nú farin at arbeiða við síni egnari fløgu, og næsta útspælið frá Kulum Rótum verður eitt sjónband, sum kemur í vetur. Á hesum sjónbandi verður tónleikur og teknifilmur.

Men næsta stóra uppgávan hjá Kulum Rótum verður í ítróttarhøllini á Hálsi, har fyrsta konsertini eisini varð hildin. Tað var í sambandi við at Creamy vóru í Føroyum. Síðani hava Kular Røtur spælt kring landið, og konsertirnar hava verið væl dámdar.



# Tilbúgvingarætlanin ikki klár fyrr enn um 1 ár

*Arbeiðið við at gera eina tilbúgvingarætlan fyri Føroyar, sum byrjaði í 1998, er komið langt, men ætlanin liggur ikki klár fyrr enn um eitt ár*



*Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, hevur nú fingið endaligu ábyrgdina av tilbúgvingarætlanini, og um nakrar dagar verður ein ávegis frágreiðing almannakunngjørd*

STEFAN Í SKORINI

Um góðar tvær vikur kann stýrisbólkurin fyri tilbúgvingarætlanina leggja eina ávegis frágreiðing fram, um hvussu langt tey eru komin í arbeiðnum at gera eina ætlan, hvussu farast skal fram, tá vanlukkur hótta ella eru hendar.

Fríggjadagin var fundur millum allar partarnar, sum eru við í arbeiðnum, og skjótt verða avvarandi myndugleikar, politikarar og almenningurin kunnað um gongdina. Tá verður tað, sum higartil er gjørt, almannakunngjørt.

Nú oljuvinnan er um at fara í gongd er enn meira neyðugt við eini fullfíggjaðari tilbúgvingarætlan fyri alt landið. Oljufeløgini hava sjálv ábyrgdina fyri øllum kring boripallin, men brúk er fyri samskipan av arbeiðnum.

### Long søga

Arbeiðið at gera eina tilbúgvingarætlan byrjaði longu í 1994, tá Beredskabsstyrelsen í Danmark í samstarvi við føroyskar myndugleikar og føroysk feløg gjørdi eina frágreiðing nevnd Bereskabet på Færøerne 1994, um viðuskiftini í Føroyum. Tá varð víst á fleiri ivasom viðurskifti, sum áttu at fáast í rættlag.

Síðani gjørdu fútaembætið saman við brunaumsjón landsins við støði í ætlanini frá Beredskabsstyrelsen eina ætlan um, hvussu farast kundi undir eina verkætlan at skipa tilbúgvingina fyri Føroyar.

Samskiftisdeildin í Vinnumálastýrinum orðaði síðani ta endaligu verkætlanina í samráð við avvarandi myndugleikar í 1998. Avgjørt varð, at Vinnumálastýrið og Føroya Landfúti hava høvuðsábyrgdina.

Endamálið var tá sum nú, at fyribyrgja, avmarka og veita hjálp, tá vanlukkur og katastrofur koma fyri, ella tá stórur vandi er fyri hesum.

Tíðarætlanin, sum sett varð í 1998 var 2-3 ár, og evstamark var summarið 2001. Tað er líkt til, at henda tíðarfreist fer at halda.

### Nógvir partar við

Nógvir ymiskir partar hava verið við í arbeiðnum at gera tilbúgvingarætlanina, og hetta hevur tarnað arbeiðnum nakað, men tað er neyðugt at hava so nógvar partar við sum gjørligt.

Vinnumálastýrið hevur havt ábyrgdina higartil, men fyri tveimum vikum síðani gjørdi løgmaður av, at flyta ábyrgdina yvir á Fiskimálastýrið, sum nú hevur formannin í stýrisbólkinum.

Tó eru tey fleiri av stýrunum undir Landsstýrinum við í stýrisbólkinum. Oljumálastýrið, Heilsumálastýrið, og Vinnumálastýrið hava øll umboð í stýrisbólkinum. Eisini eru Føroya Kommunusamskipan og Kommunufelag tikin við. Umframt tey eru Føroya Landfúti og Løgmansskrivstovan eisini við.

Undir stýrisbólkinum situr ein verkætlanarbólkur við átta umboðum, og undir verkætlanarbólkinum eru tríggir katalysatorbólkar, sum taka sær av trimum ymsum økjum í tilbúgvingarætlanini.

Tað hevur verið eitt sindur ivasamt um, hvør hevur endaligu ábyrgdina, men nú liggur hon so hjá Fiskimálastýrinum.

Landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen sigur, at tað er sera torført at arbeiða við so nógvum pørtum í Føroyum, og danskir myndugleikar hava verið innblandaðir, men tað er eisini er neyðugt í einum so stórum máli.

- Tað, sum er mest umráðandi, er at fáa samansjóða tey mongu sjónarmiðini og fáa staðfest, hvør skal hava ábyrgdina av hvørjum, sigur Jørgen Niclasen, sum leggur afturat, at enn er langt eftir á mál.

Jørgen Niclasen heldur ikki, at tað hevur verið óheppið, at vit ikki hava havt eina tilbúgvingarætlan klára, nú fyrstu boriloyvini eru givin, tí tað eru fyrst og fremst oljufeløgini, sum hava ábyrgdina av kring pallarnar, men at tað verður klárt innan eitt ár.

Jørgen heldur tað verða neyðugt at seta meira orku av í hesi verkætlanini, tí tað er eitt so stórt arbeiði, og fyri at tað skal verða liðugt til tíðina, mugu fleiri fólk setast til tilbúgvingarætlanina.

Ætlanin er at gera eina miðstøð, sum skal miðsavna alt virksemið á teimum trimum økjunum. Øki 1 er land, strond og flogvanlukkur. Øki 2 er skip, ferjur og bátar og øki 3 er frálandavirksemi.

### Nýggja tyrlu

Ein liður í tilbúgvingarætlanini er fáa eina nýggja tyrla til landið. Her eru samráðingar við Atlantic Airways í gongd um ein sáttmála, har flogfelagið skal veita eina tænastu við tyrluni.

Tað verður sostatt Atlantic Airways, sum skal gera eina íløgu í eina nýggja tyrlu. Enn er einki komið uppá pláss viðvíkjandi hesi tænastu. Tað er Vinnumálastýrið, sum í løtuni hevur ábyrgdina av at flúgving til útoyggjarnar.

Um nýggja tyrlan verður keypt skal hon nýtast til leiting og bjarging á landi og sjógvi umframt fiskiveiðieftirlit. Tyrlan verður av miðalstóra slagnum.

Tá ávegis frágreiðingin verður almannakunngjørd um nakrar dagar, hava allir partarnir gjørt sínar viðmerkingar til arbeiðið higartil.





## At læra og arbeiða effektivt

Undrast tú, hví tú ikki ert munadyggari í yrki og virki tínum? Vilt tú vera meira virkin og røkka fleiri úrslit í tínum dagliga lívi?
Vilt tú vita nakað um innlæring. førleika og intelligens og kenna tín innlærings- og intelligens-profil? Vilt tú vita nakað um heilan, minnið og minnisfremjan, "Brainstorming", "Mind Map", lesiteknikk og skjótlesing? Vilt tú læra at brúka tína mentalu orku betur, vera meira kreativ/-ur og kunna skipa arbeiðið betur?

**Endamálið við skeiðinum er:**

- at tú fært innlit í arbeiðshættir, ið gera av hvussu tú ert mest virkin og kann brúka tíðina á besta hátt
- at tú betur kanst leggja títt virksemi til rættis og brúka sum minst tið til tess
- at tú kanst varveita yvirlitið, tá tú ert illa staddur og strongdur t.d um tú *skalt halda avtalu ella leggja fram*
- at tú lærir at vera mest kreativur og hava mest hugflog

**Tíð:** 16 skúlatímar
**Tíðarskeið:** Sept. 25; 28; og okt. 2; 5. kl. 16.00 - 20.00
**Skeiðleiðari:** **Bergur Godtfred**
**Kostnaður:** Kr. 2.500,00 íroknað frálæru, tilfar og mat.
**Tilmelding:** Innan 18. september 2000

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
Marknagilsvegur 77, Postrum 177, 110 Tórshavn
Tel: 318813, Fax: 313374, T-postur: fh-sth@post.olivant.fo